gult cyan magenta svart



**Støðan, meistaradeild kvinnur:**

| Lið | leiktir | Dystir vunnir | Dystir taptir | Sett vunnin | Sett tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dráttur | 17 | 15 | 2 | 49 | 13 | 36 | 21 |
| Mjølnir | 16 | 14 | 2 | 45 | 12 | 33 | 19 |
| ÍF | 16 | 7 | 9 | 24 | 33 | -9 | 11 |
| TB | 17 | 7 | 10 | 33 | 31 | 2 | 10 |
| Fleyr | 17 | 6 | 11 | 21 | 39 | -18 | 7 |
| Fossánes | 17 | 1 | 16 | 5 | 49 | -44 | 2 |

**Støðan, meistaradeild menn:**

| Lið | leiktir | Dystir vunnir | Dystir taptir | Sett vunnin | Sett tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ÍF | 13 | 10 | 3 | 33 | 17 | 16 | 15 |
| Fram | 14 | 8 | 6 | 32 | 25 | 7 | 12 |
| Mjølnir | 13 | 9 | 4 | 33 | 18 | 15 | 11 |
| Fleyr | 13 | 6 | 7 | 22 | 24 | -2 | 8 |
| SÍ | 13 | 0 | 13 | 3 | 39 | -36 | 0 |

Fram–Mjølnir 3–2 (25-20, 15-25, 25-21, 25-27, 15-8)

# Gongur væl hjá Fram

**Fjórða dystin á rað taptu klaksvíkingar, og meðan teir nú líkjast einum liði í kreppu, er Fram nú at síggja næst ovast á stigatalvuni**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD MENN

Mjølnir skuldi royna at venda skeivu gongdini. Mjølnir hevur tapt tríggjar dystir á rað, seinast í steypafinaluni, og tí var neyðugt at vinna á Fram, skuldi vón vera um nakað gull í ár.

### Ótrygg byrjan

Bæði liðini høvdu sostatt avgjørt nakað at spæla fyri. Hjá Fram hevur kappingarárið verið upp og niður. Úrslitini hava ikki verið so góð, sum vónað varð fyrst í kappingarárinum, men seinastu dystirnir hava víst, at Fram er væl fyri júst nú. Tað ikki tað góða spælið, ið sermerkti dystin í byrjanini. Bæði liðini gjørdu nógvar servuvillur, og tað darvaði spælinum. Fram hevði ímóti Fleyr lagt stórt trýst á við hørðum servum, og tað varð aftur roynt í hesum dystinum, men illa gekst. Servurnar endaðu alla aðrastaðni enn hjá Mjølni, men sum frá leið gekst betur.

Mjølnir kom ikki rættiliga á lagið fyrr enn í 2. setti. Timburmenninir frá steypafinaluni høvdu hug at spøkja, og leikararnir vóru ikki so tryggir, ikki so avgjørdir, sum teir plaga. Fram kundi tí taka fyrsta settið rættiliga lættliga, men longu í 2. setti var Mjølnir-maskinan tendrað. Við góðum móttøkum, og skjótum álopum frá Trygva Poulsen á miðjuni, bankaði Mjølnir Fram hetta settið.

### Skiftandi yvirvág

Fram fótaði sær aftur í 3. setti. Kanska ikki so nógv tí teir spældu seg inn aftur í dystin, men heldur tí at Mjølnir ikki megnaði at halda góða spælinum uppi. »Tað er okkurt galið í høvdinum á okkum nú einaferð«, segði Trygvi Poulsen eftir dystin. »Vit missa takið á okkum sjálvum, og so er bara ein vegur«. Tað sama var galdandi í steypafinaluni, men ímóti Fram gekst tó betur.

3. settið var javnt, men Fram hevði munin. Undan dystinum var Jákup Sørensen í Fram skaddur, og tað var millum annað tí, at móttøkan hjá Fram ikki riggaði. Tíbetur fyri Fram var Jens Heri Mortensen afturkomin av skipi, og hann kom beint inn aftur á liðið. Hann stóð seg væl í álopinum, men móttøkurnar mangladu nakað. Mjølnir servaði eisini allar servurnar á hann, tí hin móttøkuspælarin hjá Fram, Rúni Weihe, tekur sera væl ímóti. Hesin taktikkurin hjá Mjølni eydnaðist væl, men tað var ikki nóg mikið til at vinna settið.

Fram var nú á odda 2-1, men dysturin var framvegis púra opin. Hesi liðini eru ógvuliga jøvn, og í 4. setti var ongantíð nakar serligur munur. Fram vann seg fram til dystarpólt, tá ið støðan var 25-24, men Mjølnir vísti gamlar dygdir, og vann settið 27-25, og enn ein 5-settari skuldi avgera hvør fór at vinna.

### Mjølnir tapir

Fram byrjaði betur enn Mjølnir í 5. setti. Tá ið liðini skiftu síðu, var støðan 8-5, og tí var einki avgjørt enn. Men nú misti Mjølnir alt á gólvið. Liðformaðurin hjá Mjølni, Bogi Isaksen kjakaðist so mikið nógv við dómaran, um ein bólt, at endin var, at hann fekk gult kort. Tá gjørdist støðan 9-5 til Mjølnir, sum tók timeout. Tað hjálpti nakað, men Borko Ilic, sum ikki rættiliga fær spælið at ganga júst nú, sló tvey tey næstu smashini út, og so var eingin vegur aftur hjá Mjølni. Fram kom tí lættliga til sigurin. Ikki so nógv við egnari hjálp. Heldur tí at Mjølnir misti alt á gólvið til seinast.

Hetta úrslitið hevur við sær, at ÍF nú hevur allar møguleikar at vinna greipuna. Mjølnir skal vinna dystin ímóti ÍF í Klaksvík, men tað er ikki nóg mikið. Fram ella Fleyr mugu hjálpa Mjølni, og vinna ímóti ÍF. Men fyrst og fremst mugu teir í Mjølni venda tapunum til sigur. Hjá Fram er gullvónin framvegis til staðar, men so skal alt ganga sera væl, og ÍF tapa tað, sum eftir er, og tað verður neyvan.



*Fjórða dystin á rað taptu klaksvikingar, og nú skulu teir hava hjálp úr Havnini, um teimum skal eydnast at fáa fatur í ÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Flogbólturin hjá Tom Hanks seldur fyri 150.000 kr.

Tvífaldi Oscarvinnarin Tom Hanks er ein sera væl umtóltur sjónleikari. Og ein hin besti garanturin fyri at nógv atgongumerki verða seld. Seinasti filmurin hjá honum, Cast Away, har Tom Hanks er strandaður á eini oydnari oyggj, tjenti eftir bert tveimum vikum meira enn 100 milliónir dollarar í USA.

Ymsir lutir sum vóru við í filminum, eru síðani seldir á uppboðssølu. Harímillum ein flogbóltur, sum Tom Hanks nýtti í filminum at stytta sær stundir við á oydnu oynni. Tá uppboðshaldarin hevði bankað hamaran í borðið á triðja sinni, var prísurin kom upp á ikki minni enn 18 400 dollarar - einar 150.000 krónur!!!

gult cyan magenta svart



Fleyr–Fossánes 1–3 (25-17, 21-25, 12-25, 22-25)

# Fossánes vann á stórbýnum

**Fyrsti sigurin hjá Dráttanesi í meistaradeildini kom langt um leingi til høldar, tá tær sunnudagin vunnu útidystin móti Fleyr**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD KVINNUR

So kom Fossánes á mál. Liðið sum á fysta sinni leikti í meistaradeildini hetta kappingarárið, hevði sett sær sum mál at vinna eitt sett, og hetta eydnaðist fyri nøkrum vikum síðani ímóti Fleyr.

Næsta málið var at vinna ein dyst, og hetta eydnaðist eisini. Og aftur var tað Fleyr sum skuldi standa fyri skotum.

Fleyr var annars liðið, sum kom best frá byrjan sunnudagin, og vann 1. settið 25-17, men so kom liðið ikki fyri seg aftur. Fossánes fór at leika betur og betur, og endin varð, at tær vunnu 2. settið 25-21. Frøin var stór, og beinan vegin í 3. setti sást, at tær ikki bert ætlaðu at vinna eitt sett.

### Stórsigur

Tá sá út til, at Fleyr ikki kom yvir skelkin, aftur at hava tapt eitt sett ímóti botnliðnum, og hetta endaði so við, at Fossánes vann triðja settið heili 25-12. Og sigurin var eisini fult uppiborin.

Í fjórða settið kom Fleyr betur við aftur, og spælið gjørdist eitt sindur meira støðugt, men tó ikki nokk til, at vinna á gentunum úr norðoyggjum.

Fossánes tók sigurin og harvið tvey stig, tá tær vunnu fjórða settið 25-22.

Hvat næsta málið hjá Fossánesi og venjaranum Jón Kára Frederiksen verður, er enn ikki allmannakunngjørt, men í morgin leika tær ímóti Mjølni, men hetta verður nokk ein ov stórur biti at taka, Men alt er ein roynd vert.



*Endiliga eydnaðist tað Fossanesi at vinna, og saman um tikið var talan um ein fult uppibornan sigur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF–Dráttur 0–3 (16-25, 15-25, 22-25)

# Dráttur beina leið móti FM-heitinum

**Trý-null sigrar eru treytin fyri, at Dráttur skal vinna føroyameistaraheitið, og móti ÍF syrgdu tær fyri, at hesar framvegis verða uppfyltar**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD KVINNUR

Vágaliðið var leygardagin á vitjan á Kambsdali, og enn einaferð megnaðu tær at vinna ein 3-0 sigur, sum eisini er krav, um tær sjálvar skulu avgera, um tær vinna FM-heitið í ár. Dráttur var klárt tað betra liðið í teimum báðu fyrstu settunum, og sigurin var ongantíð í vanda.

Men í triðja setti byrjaði ÍF brádliga at gera um seg, og tað var tætt við, at tær megnaðu at vinna hetta settið. Settið endaði 25-22 til Drátt, men um ÍF ikki hevði gjørt nakrar stórar feilir ímóti endanum av dystinum, so kundi tað væl verið, at fuglfirðingarnir kundu havt vunnið settið.

### Framvegis eitt sett betri

Dráttur hevur framvegis munin niður til Mjølnir á 2. plássi, og um Dráttur vinnur teir báðar eftirverandi dystirnar 3-0, so endar FM-heitið í kvinnuflogbólti í Vágum, har tað ikki hevur verið síðani 1980. Tá vann SÍF meistarheitið annað árið á rað, og undan hesum hevði MB vunni FM-heitið í árunum frá 1976 til 1978. Sostatt var FM-heitið í Vágunum í 5 ár á rað, áðrenn Mjølnir vann heitið frá 1981 til 1988.

Men kanska søgan endurtekur seg.

ÍF–SÍ 3–0 (25-18, 25-12, 25-15)

# ÍF hómar greipuna

**Uttan stórvegis trupulleikar vunnu fuglfirðingar móti botnliðnum úr Sørvági, og halda teir sostatt beina kós móti gullmerkjunum**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD MENN

Steypavinnararnir ÍF vunnu dystin á SÍ um vikuskiftið. Tað var nú ikki annað væntandi, tí ÍF er sera væl fyri, og SÍ hevur als ikki fingið nakað at borið til hetta kappingarárið. Til henda dystin var Jón Nielsen við á liðnum hjá SÍ, men Suni Hansen er skaddur og Anfinn Joensen hevði forfall, og so tynnist stórliga á annars unga SÍ-liðnum.

Hjá ÍF liggur sera væl fyri. Teir megnaðu sjálvir at vinna 2 stig hetta leikumfarið, og Mjølnir tapti í Havn, so nú eru teir 4 stig frammanfyri Mjølnir, so alt bendir á, at greipan endar í Fuglafirði. Í hesum dystinum bar til hjá ÍF at royna ymiskar uppstillingar, so allir menn sluppu at royna seg. SÍ var í 1. setti rættiliga væl við alla tíðina, men tó var ÍF so mikið frammanfyri, at ongantíð var ivi um hvør fór at vinna. Í hinum báðum settunum hevði ÍF fullkomið tak á øllum og kundi lættliga taka stigini heim.

SÍ er framvegis á endaplássinum og hevur einki stig fingið enn. Fyrst í kappingarárinum sá alt so ljóst út hjá SÍ, men tíverri hava nógvir trupulleikar verið í kappingarárinum. Vónandi fáast hesi viðurskifti í rættlag, tí nógvir ungir góðir leikarar eru í SÍ.

TB–Mjølnir 0–3 (11-25, 12-25, 12-25)

# Mjølnir framvegis við

**Mjølnir kvinnurnar royna at gera sítt til, at møguleikin fyri FM-heitinum framvegis er á lívi**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILDKVINNUR

Tað gjørdist ikki TB, sum støðgaði sigursrøðini hjá Mjølni á hesum sinni. Í høllini í Trongisvági smurdi Mjølnir suðuroyarliðið av, og eingin ivi var nakrantíð um, at klaksvíkingarnir vilja gera alt fyri at fáa føroyameistarheitið.

Mjølnir leikti væl allan dystin, frættist av Tvøroyri, og tað var til tíðir ein frægd at síggja tað góða spælið, sum steypavinnararnir sýndu sunnudagin. Tað var líka mikið, um álopini vóru frammi við netið, ella lopið var á við backspike. Alt virkaði sum tað skuldi.

### Marjun og Tina

Men tað var serlig samanspælið millum Tinu Jacobsen og Marjuna Kalsø, sum bergtók áskoðararnar í høllini á Tvøroyri. Ferð aftan á ferð var samaspælið millum hesar við til at útspæla TB-liðið, og tað vóru hevingar og smassj við stíli í. Tær báðar vóru við til at gera tann annars ójavna dystin til nakað serligt, og tað er at vóna, at tær klára at halda dampin uppi, til landsliðið veruliga fer undir sínar venjingar til Oyggjaleikirnar á Man í summar.

Mjølnir liggur eftir dystin leygardagin framvegis á 2. plássi við tveimum stigum minni enn Dráttur. Men tær hava eisini leikt ein dyst minni. Settmunurin er betri hjá Drátti, so um Dráttur ikki tapir eitt sett í teimum eftirverandi dystunum, so verður tað Mjølnir sum fær silvurmerkini.